

## Nýggjur sparkivøllur við Eysturskúlan

Stásiligur fótbóltsvøllur er reistur við Eysturskúlan í Havn. Tað er á økinum, har frælsi ítrótturin hevur búleikast árini, áðrenn Tórsbreyt var tikin í nýtslu. Fótbóltsvøllurin er 70 metrar langur og 50 metrar breiður. Myndamaður okkara var á staðnum fríggjadagin, tá ungdómar úr Eysturskúlanum hugnaðu sær í fríkorterinum.

*uni@sosialurin.fo*



# Bogaskjúttarnir gjørdu bart

**BOGASKJÓTING Fimm gullheiðursmerki og trý silvurheiðursmerki var úrtøkan hjá fimm føroyskum bogaskjúttum, sum tóku lut í kapping í Hetlandi um vikuskiftið**

Uni Holm Johannesen

Talan er um 4th North Atlantic Archery Tournament kappingina, sum verður fyriskipað árini millum oyggjaleikirnar.

Luttandi lond vóru Føroyar, Hetland og Orknoyggjar.

Leygardagin var skotið OL-umfar, sum umfatar 72 pílar á 70 metrum.

Eggaba Andreasen, Vága-Skot, vann gull fyri recurve menn. Jastrid M. Jensen, Tambar, vann silvur í recurve kvinnur, Jógvan Niclasen, Tambar, vann gull í compound menn, og Rakul Dam, Tambar, vann gull í compound kvinnur.

Sunnudagin var fult FITA-umfar, sum umfatar 36 pílar á fýra ymiskum frástøðum – menn 90-70-60-30 metur, og kvinnur 70-60-50-30 metur.

Eggaba Andreasen gjørdi aftur um seg og vann silvur við 1127 stigum, sum er persónligt met. Jastrid M. Jensen vann gull við 1056 stigum, sum er persónligt met. Jógvan Niclasen vann gull í compound menn við 1338 stigum, og Rakul Dam vann silvur í compound kvinnur við 1240 stigum.

*uni@sosialurin.fo*

## Føroyska 1. Deild *menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 20 | 12 | 4 | 4 | 49 | 19 | +30 | 40 |
| 2 | 07 Vestur | 19 | 11 | 6 | 2 | 45 | 19 | +26 | 39 |
| 3 | TB | 21 | 12 | 3 | 6 | 46 | 25 | +21 | 39 |
| 4 | HB II | 21 | 10 | 3 | 8 | 43 | 44 | -1 | 33 |
| 5 | EB/Streymur II | 19 | 9 | 5 | 5 | 40 | 26 | +14 | 32 |
| 6 | NSÍ II | 20 | 6 | 7 | 7 | 29 | 38 | -9 | 25 |
| 7 | Víkingur II | 20 | 7 | 4 | 9 | 30 | 40 | -10 | 25 |
| 8 | AB II | 20 | 7 | 2 | 11 | 25 | 45 | -20 | 23 |
| 9 | FC Hoyvík | 20 | 5 | 5 | 10 | 26 | 37 | -11 | 20 |
| 10 | B68 II | 20 | 0 | 3 | 17 | 12 | 52 | -40 | 3 |

## Føroyska 1. Deild *kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 17 | 15 | 2 | 0 | 82 | 9 | +73 | 47 |
| 2 | AB | 17 | 13 | 1 | 3 | 82 | 13 | +69 | 40 |
| 3 | Skála | 17 | 7 | 4 | 6 | 31 | 25 | +6 | 25 |
| 4 | Víkingur | 17 | 6 | 1 | 10 | 20 | 48 | -28 | 19 |
| 5 | EB/Streymur | 16 | 2 | 4 | 10 | 14 | 56 | -42 | 10 |
| 6 | MB | 16 | 0 | 2 | 14 | 7 | 85 | -78 | 2 |

**Vík – AB** 0-7 (0-0)

Dómari: Jón Kári í Brekkuni

**0-1: Mona Breckmann, 48.**
**0-2: Elsa Splidt Jacobsen, 55.**
**0-3: Nelly Poulsen, sjálvmál, 58.**
**0-4: Mona Breckmann, 59.**
**0-5: Olga Kristina Hansen, 66.**
**0-6: Rakul Jógvansdóttir, 67.**
**0-7: Olga Kristina Hansen**

**Skála – KÍ** 0-2 (0-0)

Dómari: Vinjard Dam

**0-1: Sofía Purkhús, 64.**
**0-2: Sofía Purkhús, 90.**

# Togast í oddinum

**FÓTBÓLTUR Jógvan Isaksen var tryggur, tá hann sendi úr ellivu metrum í tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat. KÍ vann á útivølli móti Víkingi, og er nú oddalið**

Uni Holm Johannnesen



*Í botninum vunnu hoyvíkingar greitt 3-0, tá næstbesta liðið hjá AB vitjaði á niðara vølli í Gundadali í gjár.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Teir togast av álvara í oddinum í næstbestu deildini.

KÍ er oddalið í løtuni. Klaksvíkingar hava eitt stig fleiri enn 07 Vestur, sum spælur í kvøld.

TB er nummar trý. Teir hava eisini eitt stig minni enn KÍ, men hava hinvegin spælt ein dyst fleiri enn klaksvíkingar.

Soleiðis er støðan aftaná vikuskiftið.

Meðan Vodafonedeildin hvíldi seg um vikuskiftið, tí landsdystir vóru á skránni, so varð spælt í næstbestu deildini.

Ásetingarnar siga, at teir, sum eru 21 ár og yngri, kunnu spæla við í Vodafonedeildini og 1. deild, um dystirnir ikki eru sama dag. Tí hjálptu fleiri yngri leikarar við á næstbesta liðnum um vikuskiftið.

### Í seinastu løtu

KÍ var skert til útidystin í Leirvík. Steffan Kalsø, Høgni Madsen og Henry Heinesen vóru útvístir seinastu vikuskiftið og vóru tí ikki tøkir.

Tað stóð nógv á klaksvíkingum, sum á Summarfestivalinum taptu 4-2 móti Víkingi.

Vanliga leiktíðin var farin, tá dómarin floytaði fyri brotssparki til KÍ. Jógvan Isaksen var tryggur. Úrslitið var 2-1.

Víkingur spældi við 10 monnum, tí Hans Jørgen Djurhuus varð útvístur, tá fyrri hálvleikur var hálvunnin.

Álvur F. Christiansen skoraði eisini fyri KÍ. Bárður J. Hansen stóð fyri málinum hjá Víkingi.

### TB í trupulleikum

TB, sum vitjaði á Toftum, var í trupulleikum.

Úrslitið var 1-1, og heimamenninir kendu seg ikki hava fingið tað burturúr, sum spælið og møguleikarnir vóru til.

B68 hevur framvegis fyrsta sigurin til góðar, og TB misti týdningarmikið fet í toppstríðnum. Vitjanirnar hjá tvørámonnum á Skálafjørðinum hava verið kostnaðarmiklar. Fyrst tapti TB í Runavík, og nú fingið teir bara eitt stig á Toftum.

### Hoyvíkingar vunnu

FC Hoyvík stríðist framvegis fyri at sleppa undan niðurflyting.

Hoyvíkingar vunnu greitt 3-0, tá næstbesta liðið hjá AB vitjaði í gjár.

Jón Brekku, Ken Nónklett og Tony Rasmussen vóru málskjúttar.

Við sigrinum er bjargingarsessurin bara trý stig burtur hjá hoyvíkingum.

Merkisvert var tað, at Heðin Stenberg, sum hevur verið málverji á besta liðnum hjá AB í ár, var framherji hjá næstbesta liðnum um vikuskiftið.

NSÍ flutti seg burtur frá hóttanina av niðurflyting, tá runavíkingar vunnu 2-1 á heimavølli móti HB. Jann Martin Mortensen og Árni Frederiksberg skutu málini hjá heimaliðnum, og Páll Holm Jacobsen var málskjútti hjá HB.

07 Vestur fær vitjan av EB/Streymi í kvøld. Dysturin byrjar klokkan 18.00.

*uni@sosialurin.fo*

**B68 – TB** 1-1 (0-1)

Dómari: Dia Lamhauge

**0-1: Jón Magnusarson, 13.**
**1-1: Jónleif Højgaard, 48.**

**FCH – AB** 3-0 (0-0)

Dómari: Eiler Rasmussen

**1-0: Jón Brekku, brts., 61.**
**2-0: Ken Nónklett, 87.**
**3-0: Tony Rasmussen, 90.**

**NSÍ – HB** 2-1 (1-1)

Dómari: Petur Reinert

**1-0: Jann Martin Mortensen, 4.**
**1-1: Páll Holm Jacobsen, 22.**
**2-1: Árni Frederiksberg, 51.**

**Vík. – KÍ** 1-2 (0-1)

Dómari: Bárður Mortensen

**0-1: Álvur F. Christiansen, 22.**
**1-1: Bárður J. Hansen, brts., 77.**
**1-2: Jógvan Isaksen, brts., 90.**